

*Klokkan hálvgum átta sunnumorgun bíðaðu stevnugestir framvegis við bryggjuna í Nólsoy eftir Rituni.*

# Fyriskipararnir væl nøgdir

**Burtursæð frá flóskuhálsinum við bryggjuna, tá fólk bíðaðu í fleiri tímar eftir at sleppa til Havnar, spældi ovastevnan væl av, sambært fyriskiparunum**

OVASTEVNA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

– Sum heild eru vit væl nøgd við ovastevnuna. Vit settu met, og samarittar, hjálparfólk, løgregla og bjargingarlið røktu uppgávuna til fulnar, sigur Jákup av Skarði, formaður fyri stuðulsbólkinum fyri svimjihyli í Nólsoy.

Sambært formanninum vóru upp móti 5000 stevnugestir, og burtursæð frá onkrum hendinga slagsmáli gekk alt friðarliga fyri seg.

Men, sum vant, var long bíðirøð við bryggjuna um morgunin, tá stevnugestirnir skuldu sigla aftur til Havnar. Seinastu stevnugestirnir fóru við Rituni klokkan hálvgum átta um morgunin.

– Tað er keðiligt, at fløskuhálsurin hjá Strandferðsluni oyðileggur heildarupplivilsið. Strandferðslan eigur jú alla skylduna. Síðani mei mánað hava vit mint á, at Ritan ikki megnar at nøkta tørvin, og hóast Silja Star eisini hjálpti, var hetta ikki nóg mikið, sigur Jákup av Skarði.

### Hildu í hegninum

Hann undrast á, at Silja Star gavst at sigla júst tá ið tørvurin var størstur. Tá harðast stóð á júst eftir klokkan fýra var stór troðkan niðri við bryggjuna. Hóast fyriskipararnir høvdu brynjað seg við løntum vaktarfólki og einum hegni, var hetta ikki nóg mikið. Løgreglan, ið var til staðar, varð noydd at hjálpa til.

– Vit noyddust at halda í hegninum, so fólk ikki fóru útav, sigur Jákup av Skarði.

Eitt skifti koppaði hegnið. Ein orsøk til troðkanina var, at tjaldið, har konsertin varð hildin, varð stongt klokkan fýra. Og av tí at einki annað tiltak var, streymaðu fólk oman á bryggjuna. Jákup av Skarði ásannar, at tað var óheppið at steingja tjaldið, men hetta var neyðugt, tí treytirnar fyri at hava skeinkiloyvi vóru, at tjaldið skuldi vera tómt klokkan fýra.

### Strandferðslan skal taka sær um reiggj

Jákup av Skarði vónar, at næsta ár verður okkurt gjørt, soleiðis at fólk ikki vera rikin á dyr samstundis. Hann sigur seg eisini vóna, at Strandferðslan tekur sær um reiggj og ger okkurt við stóra tørvin á flutningi um náttina. Hann leggur afturat, at í 2009 er nýggja skipið, sum landsstýrismaðurin við Innlendismálum hevur lovað, komið. Sum skilst verður hetta skipið á støðd við Sam.

# Ritan er ov lítil

**Ein av fyrireikarunum av Ovastevnuni, ið hevur drúgvar royndir, heldur, at tað er ov lítið bert at hava Rituna siglandi, tá Ovastevnan er**

OVASTEVNA
*Dagfinn Olsen*

Una Hansen hevur í mong ár verið við til at fyrieika Ovastevnuna. Hon hevur drúgvar royndir, og hevur enn ein leiklut í stevnufyrireikingunum, sum peningarøkil í stuðulsnevndini.

Stevnugestir hava ført fram, at stevnan er nógv vaksin, og at t.d. flutningsmøguleikarnir ikki hava fylgt við.

Hesum er Una Hansen samd í.

Hon sigur seg ikki rættiliga duga at lýsa munin á stevnuni fyrr og nú, men hon leggur dent á, at tað eru fleiri fólk nú, enn áður.

– Eg haldi, at fólk her úti í Nólsoy hava innstillað seg uppá, at soleiðis er tað, og at hetta er eitt stórt tiltak. Og eisini, at hetta er tiltak, ið er komið fyri at verða, sigur Una Hansen.

### Ritan ov lítil

Una Hansen sigur, at stevnan var góð í ár, og eydnaðist væl.

– Men at Ritan er ov lítil, kunnu vit øll vera samd um, sigur Una Hansen.

– Vit høvdu ølsølu í tjøldum í ár, og klokkan 04 stongdi ølsølan. Tað var eitt sindur óheppið, tí tá máttu øll út og tað regnaði, Fólk høvdu ongastaðni at fara, sigur Una Hansen.

Og tá bert Ritan er at sigla stevnugestir um fjørðin, so tekur tað tíð at fáa øll fólkini flutt til Havnar.

– Hetta er nakað, ið má broytast, sigur Una Hansen avgjørd.

Hon metir tó ikki, at talan var um kaos á bryggjuni í Nólsoy, men viðgongur, at nógv fólk stóð á bryggjuni sunnumorgunin, men at alt spældi væl av, serliga í mun til hvussu nógv fólk var á Ovastevnu.

– Fyrreikararnir sluppu til songar klokkan 9 á morgni, tí tá vóru øll sloppin avstað, sigur Una Hansen. Hon metir ikki, at stevnan er ov stór, men at tað er jaligt, at stevnan dregur nógv fólk.

– Serliga var gleðiligt í ár, at ein sá ikki nógvar fløskur, ella brotnar fløskur, so hetta lætti um uppruddingararbeiðið. Hetta var væl skipað hjá teimum, ið tóku sær av ølsøluni, tí hetta vóru fólk uttanífrá, tí hetta høvdu vit ikki megnað sjálvi, sigur Una Hansen.

Una fegnast um, at stevnan eydnaðist væl og serliga fegnaðist hon um, at Frelsunarherurin tók lut í setanini og við útimøti.

Una Hansen sigur, at tað merkist í bygdini dagarnar eftir stevnuna, at bygdin hevur verið vertur fyri Ovastevnu, tí øll í bygdini eru við í stevnuni so ella so, og fólk flest hava gestir.

# Fluttu yvir 4000 fólk um Nólsoyarfjørð

**Andras Jensen á Strandferðaskipum Landsins metir, at ferðamannaflutningurin sum heild gekk væl í samband við Ovastevnuna**

OVASTEVNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyribilstøl hjá Strandferðaskipum Landsins vísa, at flutningutin var á leið hin sami, sum undanfarin ár, kanska nakað meira, tað vil siga á leið 3500 fólk aftur og fram.

Andras Jensen sigur, at tølini fyri Rituna teir 3 vikuskiftisdagarnar vísa, at 1440 sigldu við út og 1879 inn. Í alt 3319 fólk.

Harafturat hevði Strandferðalan Silju Star í sigling og førdi hon á leið 1000 fólk, metir Andras Jensen, men hann hevur ikki ítøkiligu tølini enn.

Sostatt vórðu yvir 4000 fólk flutt við Rituni og Silju Star.

Ritan sigldi leygardagin 30 túrar og Silja Star eini 10 túrar.

– Ongin ófriður var umborð, sigur Andras Jensen.

Til kjakið um, at tað tók ov langa tíð at flyta fólk, og at fólk bíðaðu ov longi á bryggjuni í Nólsoy, sigur Andras Jensen, at um 2000 fólk skulu flytast innan tveir tímar, so krevst størri bátur. Ternan var ikki tøk, og hon hevur verið roynd áður.

- Hon er so stór, at hon siglir ikki so ofta. Vit hava hinvegin størri títtleika við Rituni og Silju Star, og harvið hægri kapasitet við hesum báðum, sigur Andras Jensen, og leggur afturat, at størri skip eisini kostar nógvan pening at seta inn.